*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 4 | Veturin 2021 | pedagogfelag.fo



## Útholað endurgjald hóast viðhald

## 40 ára rit komið væl á leið

## Økt játtan skal til børnini

## Korona vísir sanna virðið á starvsfólkunum

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
400 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Skrivari
harald@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Nevndarlimur
annika@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo





**4** Útholað endurgjald hóast viðhald

**10** 40 ára rit komið væl á leið

**13** Økt játtan skal til børnini

**16** Korona vísir sanna virðið á starvsfólkunum



# ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# MILLUM ALTJÓÐA SAMSTARV, AVBJÓÐINGAR OG GERANDISSTØÐUR

Tað er einki at ivast í, at vit í Føroyum hava verið nógv betri vard ímóti negativu avleiðingunum av koronustøðuni enn flest øll onnur lond ella støð í heiminum. Í Brasil hava myndugleikarnir gingið í tveimum – forsetin, ið ikki hevur trúð uppá, at avmarkingar vóru neyðugar, og so ymisku landsparta-myndugleikarnir, sum hava sett síni øki niður í ferð. Deyðstíttleikin hevur eisini verði ógvusligur.

Vit fóru niður í ferð í mars-apríl 2020, og nógvastaðni eru framvegis stórar avmarkingar á virkseminum hjá tí einstaka borgaranum. Fyri fleiri á serstovnaøkinum, har avmarkingar hava verið og eru, hevur hetta stóra ávirkan á sosialpedagogiska arbeiðið. Í summum førum hava starvsfólkini á sosialpedagogiska virkisøkinum púra mist sambandið við teir borgarar, tey vanliga arbeiða við. Fyri ikki at tala um har, ið smittuvandin gjørdist ella er ógvusliga stórur, tí ikki ber til at arbeiða í fjarstøðu frá búfólkum ella brúkarum. Sálarstøðan hjá vanliga Føroyinginum er kanska ikki líka ógvusliga rakt sum nógvastaðni í útheiminum. Men meinast rakt eru tey, ið frammanundan hava sosialar avbjóðingar at dragast við, og sum vegna koronu eisini eru vorðin avmarkað í sínum sosialu sambondum.

Kanska byrja vit nústani at kenna sálarliga sviðan av áhaldandi átøkunum.

Í fjør ynsktu vit eina vandaviðbót, hetta serliga fyri tey mest útsettu í sambandi við koronusmittuna. Tíðin var tó ikki búgvin at viðgera eina slíka viðbót – og vit kunnu so eisini staðfesta, at hugurin at lata eina slíka viðbót ikki røkkur serliga langt, hóast onkrir arbeiðsgevarar hava latið nøkrum starvsfólkabólkum eina viðbót.

Vit høvdu tó ynskt, at arbeiðsgevarar sóu, at fleiri limir í pedagogfelagnum eisini hava nakrar sera torførar umstøður at virka undir og tí eisini høvdu uppiborið eina viðbót.

Hyggja vit at framtíðarútlitunum fyri okkara yrki eru fleiri góðir tónar at hoyra. Útbúgvingarliga eru útlit fyri, at fleiri sleppa at lesa til námsfrøðing. Tó tað enn ikki er greitt, nær hetta verður ein møguleiki, so verður arbeitt við, at Fróðskaparsetrið skal taka fleiri lesandi inn.

Kommunur tykjast at hava skilt, at neyðugt er at vaksa um normeringarnar og bøta um arbeiðsumstøðurnar. Summar kommunur hava lagt tímar av til fyrireiking og eftirmeting av pedagogiska virkseminum. Tórshavnar kommuna er eisini við at gera eina stóra broyting, har farið verður frá einari tímajáttan í krónum, til at játtanin verður í tímum. Hetta eigur at elva til betri umstøður úti á teimum einstøku stovnunum. Umframt hetta hava tey eisini boðað frá, at eyka tímar verða settir inn í vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlunum.

At hugur nú er til at bøta um hesi viðurskifti ber boð um, at tit, ið arbeiða á økinum, nú verða hoyrd.

Fólkaskúlin er eisini í eini menningartilgongd, og hóast langt er á mál, tykist eisini har vera ein vilji at taka tær avbjóðingarnar í álvara, sum tit, ið starvast har, støðugt vísa á.

Í Almannaverkinum er úrskurður sagdur í "Yvirtíðarmálinum", og er tað púra greitt sligið fast, at um arbeitt verður meira enn 40 tímar í meðal um vikuna, so eiga tit yvirtíðargjald, sama hvør hevur biðið starvsfólkið arbeitt tímarnar. Hetta kunnu tit lesa meira um inni í blaðnum.

Vit í nevndini og á skrivstovu í felagsins vilja við hesum ynskja tykkum øllum góðan lesihug og eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.



*- Eg havi ongantíð fyrr sæð, at tú missir eitt krav vegna passivitet, har mann veit, at debitor er í óndari trúgv, sigur Christian Andreasen, advokatur, sum førdi sakina í serliga gerðarrættinum vegna Føroya Pedagogfelag. Hann kallar úrskurðin hjá gerðarrættinum fyri eina salomoniska fríhondstekning*

*Mynd: Finnur Justinussen*

# ÚTHOLAÐ ENDURGJALD HÓAST VIÐHALD

**Føroya Pedagogfelag fekk viðhald í máli um yvirtíðargjald til tríggjar tænastumannasettar pedagogar, men serligi gerðarrætturin gjørdi samstundis av, at størsti parturin av kravinum var fyrnaður. Christian Andreasen, advokatur, undrast stórliga á ta niðurstøðuna**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Tað var ein sigur við einum heldur beiskum atsmakki, tá Føroya Pedagogfelag 12. oktober vann eitt gerðarrættarmál ímóti Fíggjarmálaráðnum, sum varðar av landsalmennu lønarsáttmálunum, um løn fyri yvirtíð til tríggjar tænastumannasettar pedagogar hjá Almannaverkinum.

Tí samstundis sum serligi gerðarrætturin gav Pedagogfelagnum viðhald, gjørdi hann av, at meginparturin av kravinum var annaðhvørt fyrnaður ella mistur vegna passivitet.

Tey trý tænastumannasettu starvsfólkini starvast øll á serstovnaøkinum.

Kravið snúið seg um at fáa útgoldið yvirtíð fyri eitt tíðarskeið upp á sjey ár, frá januar 2013 til januar 2020, har tey trý starvsfólkini høvdu fingið útgoldið vanliga løn fyri

### Serligi gerðarrætturin

Trý fólk manna serliga gerðarrættin, sum er ásettur í tænastumannalógini, og sorinskrivarin er altíð ein teirra. Hinir báðir limirnir skulu útnevnast av ávikavist landsstýrinum og yrkisfelagnum, ið varðar av málinum, sum viðgerast skal.

Umframt Henrik Møller, sorinskrivara, hevði landsstýrið (Fíggjarmálaráðið) hesa ferð útnevnt Duritu Tausen, deildarstjóra á Gjaldstovuni, til dómara, og Føroya Pedagogfelag hevði útnevnt Sigmund Poulsen advokat.

arbeiði, sum sambært avtaluni ímillum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið um arbeiðstíðarreglur átti at verið avroknað sum yvirtíð.

Tað helt meirilutin í serliga gerðarrætturin, Henrik Møller og Sigmund Poulsen eisini, at tað átti. Triði dómarin, Durita Tausen, helt hinvegin, at Føroya Pedagogfelag í

longri tíð tigandi hevði góðtikið, at vanlig tímløn bleiv goldin fyri yvirtíðararbeiði á serstovnaøkinum.

Meirilutin ræður í gerðarrættarmálum, so Føroya Pedagogfelag fekk viðhald í, at tey trý starvsfólkini av røttum skuldu havt gjald fyri yvirtíð, sum er 50 prosent oman á vanligu lønina.

## Meirilutin skifti

Men tá gerðarrættur eisini skuldi taka støðu til, hvørt tey trý starvsfólkini høvdu mist rættin til yvirtíðina vegna fyrning og/ella óvirkni (passivitet), skifti meirilutin í serliga gerðarrættinum. Nú vóru Henrik Møller, sorinskrivari, og Durita Tausen í parti.

Tey hildu, at Føroya Pedagogfelag undir sáttmálasamráðingunum í 2015 var vorðið vitandi um vantandi yvirtíðargjaldið, tí Fíggjarmálaráðið tá hevði biðið um at fáa eitt brot inn í sáttmálan við yvirskriftini “Sjálvboðið eyka arbeiði” vísandi til, at “siðvenja hevur verið, at starvsfólk, ið eru í føstum starvi hava avtalað við arbeiðsgevaran, at tey arbeiða eyka sum tímalønt hjá sama arbeiðsgevara uttan at fáa yvirtíð goldna. Bæði starvsfólk og stovnar hava mett hetta vera ein fyrimunur”.

Pedagogfelagið kendi tó onki til nakra sovorðna siðvenju og visti ikki, hvørji størv ella arbeiðspláss, sipað varð til. Felagið havnaði eisini ynskinum frá Fíggjarmálaráðnum. Men meirilutin í gerðarrættinum metti, at Føroya Pedagogfelag í hvussu er tá í 2015 fekk at vita, at yvirtíðararbeiði fyri vanliga tímaløn bleiv praktiserað á serstovnaøkinum. Kortini hevði felagið ikki kravt yvirtíðina útgoldna fyrr enn í september 2018.

## Fáa lítið og onki

Úrskurðurin hjá serliga gerðarrættinum bleiv ein millumloysn, um til ber at siga so, sum sigur, at Fíggjarmálaráðið bara skal rinda teimum trimum starvsfólkunum vantandi yvirtíð fyri tíðarskeiðið eftir 18. september 2018, tá Føroya Pedagogfelag fyrstu ferð vegna sínar limir kravdi Almannaverkið eftir pengunum, til januar 2020, beint undan, at felagið beindi málið í serliga gerðarrættin.

Í praksis merkir úrskurðurin, at tey trý starvsfólkini at kalla onki endurgjald fáa, tí mannagongdin at rinda vanliga tímaløn fyri yvirtíð steðgaði í 2018-2019.

Føroya Pedagogfelag hevði annars í rundum tølum kravt Almannaverkinum/Fíggjarmálaráðnum eftir ávikavist 656.000 krónum, 646.000 krónum og 129.000 krónum, sum var munurin ímillum vanligu tímalønia, sum tey trý starvsfólkini høvdu fingið, og yvirtíðarlønina, tey áttu at havt fingið tey sjey árini frá januar 2013 til januar 2020.

## Salomonisk fríhondstekning

Christian Andreasen, advokatur, førdi málið fyri Føroya Pedagogfelag, og hann er stórliga bilsin yvir tann partin av úrskurðinum, sum er um fyrning og passivitet – og ikki minni um, at Fíggjarmálaráðið sleppur frá at rinda yvirtíð fyri tíðina áðrenn 18. september 2018.

– Hasin úrskurðurin er øgiliga torførur at skilja, og eg eri als ikki samdur við niðurstøðuni, og tað so øgiliga langt burtur frá eisini. Hetta er ein úrskurður, sum er eitt slag av – eg veit ikki, hvat man skal siga – eini salomoniskari fríhondstekning, sigur hann.



Advokaturin heldur tað eisini vera sera løgið, at Fíggjarmálaráðið undir fyrireikingunum til gerðarrættarmálið ikki legði serligan dent á fyrning og passivitet, sum annars endaði við fullkomiliga at úthola niðurstøðuna um, at starvsfólkini kortini av røttum áttu at havt fingið yvirtíðarløn.

– Tað, sum Fíggjarmálaráðið helt upp á undir fyrireikingunum, var, at ein lokal siðvenja var íkomin, sum broytti sáttmálan. Júst tað kann saktans henda, men so skal tað hava gingið fyri seg heilt leingi, og báðir partar skulu onkursvegna hava innrættað seg eftir tí. Men hesum vísti sorinskrivarin aftur, at so var ikki.

– Kortini kemur meirilutin í gerðarrættinum til ta niðurstøðu, at av tí, at tað er gingin so lang tíð og hetta og hatta, so hevur Pedagogfelagið við støði í passivitetsreglum mist størsta partin av sínum kravi. Tað er púra óskiljandi, sigur Christian Andreasen.

## Siðvenja var sáttmálabrot

Hann heldur úrskurðin vera undrunarsaman av fleiri orsøkum. Millum annað verður víst til eina grein í Pedagogblaðnum nr. 1, 2015, har tað kemur fram, at Maud Wang Hansen, táverandi forkvinna í Føroya Pedagogfelag, í hvussu er kendi til málið tá.

– Men í greinini, sum víst verður til, ger hon júst púra greitt, at hon als ikki góðtók, at sáttmálin ikki bleiv fylgdur. Tað framgongur eisini greitt, at forkvinnan var vorðin varðug við, at limir í felagnum ikki fingu goldið yvirtíð, tí hon hevði sæð tað í ársfrágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini, sigur advokaturin.

Tað var við øðrum orðum ikki ein vitan, hon sjálv hevði gingið runt við, uttan at gera nakað.

## Kendu ikki málið

Christian Andreasen leggur eisini dent á hendingina undir sáttmálasamráðingunum í 2015, tá Føroya Pedagogfelag vísti frá sær ynskið hjá Fíggjarmálaráðnum um at fáa at fáa eina siðvenju, sum ráðið kallar tað, um vanliga tímaløn í staðin fyri yvirtíð staðfesta í sáttmálanum.

Fíggjarmálaráðið hevur ført ta hendingina fram sum prógv fyri, at Føroya Pedagogfelag síðan tá hevur kent til ítøkilig útgjøld av vanligari tímaløn í staðin fyri yvirtíðarløn, og meirilutin í serliga gerðarrættinum tók tað til eftirtektar.

– Men tað er týðiligt út frá avhoyringunum og teimum skjølunum, sum vórðu løgd fram í gerðarrættinum, at táverandi nevndin og umsitingin í Pedagogfelagnum ikki vóru greið yvir, hvørjar arbeiðsgevarar, tað snúið seg um, og hvat fyri siðvenju, Fíggjarmálaráðið meinti við. Tú kanst ikki tosa um, at ein partur er passivur í einum máli, sum hann ikki veit um, sigur Christian Andreasen.

## Stóð við sín rætt

Føroya Pedagogfelag hevur annars við onnur høvi, millum annað á fundi 16. januar 2015, gjørt Almannaverkinum púra greitt, at arbeiði á sonevndum nulldøgum – regulerum frídøgum – skal lønast sum yvirtíð, tað er við 50 prosentum oman á vanligu lønina, sama um talan er um sjálvboðið ella álagt arbeiði.

Tí heldur advokaturin heldur ongan iva vera um, at Føroya Pedagogfelag alla tíðina bæði hevur lagt dent á, at limirnir skuldu hava løn sambært sáttmálanum, og eisini týðuliga gjørt vart við, at felagið stóð við sín rætt.

## Noydd at arbeiða yvir

Sjálvt um Fíggjarmálaráðið heldur upp á, at talan var um siðvenju, og at starvsfólkini sjálv ynsktu at fáa eyka tímar fyri vanliga tímaløn uttan fyri vanligu vaktarsettu arbeiðstíðina, so er tað í andsøgn við tað, sum starvsfólkini sjálv hava greitt serliga gerðarrættinum frá.

Øll trý søgdu, at tey kendu seg noydd at arbeiða yvir, tí annars hingu arbeiðsætlanirnar ikki saman.

Eitt starvsfólk segði, at øll á arbeiðsplássinum høvdu arbeitt yvir, og at leiðarin hevði sagt, at tey ikki fingu yvirtíð fyri tað. Tey fingu at vita, at tey bara fingu yvirtíðarløn, um tað varð teimum álagt at arbeiða yvir.

Eitt annað starvsfólk greiddi frá, at tey arbeiddu í vaktum, og at starvsfólkini sjálv løgdu arbeiðsætlanirnar til rættis, men at tað ofta var starvsfólkatrot, so tey noyddust at arbeiða yvir. Starvsfólkið hevði ikki biðið um yvirtíðargjald, tí tað hevði ikki hugsað um tað. Tað var ikki fyrr enn undir verkfallinum í 2018, at tey vóru farin at tosað um yvirtíð – teir tænastumannasettu námsfrøðingarnir vóru jú ikki umfataðir av verkfallinum.

Triðja starvsfólkið greiddi frá, at tað hevði arbeitt heilt nógv, men helt, at tað fekk ta lønina, viðkomandi hevði rætt til, tí tað hevði spurt sín leiðara um tað og fekk at vita, at lønin var í lagi. Men undir verkfallinum ársskiftið 2017-2018 var starvsfólkið eisini til arbeiðis á einum stovni í Vágum. Har fekk tað yvirtíðarløn, og tástani fann starvsfólkið út av, at tað eisini hevði krav upp á hesa yvirtíðarlønina.

## Í óndari trúgv

Christian Andreasen ger vart við, at tað vanliga er, at skalt tú missa eitt krav vegna passivitet, so skal debitor hava verið í góðari trúgv, og kreditor skal hava uppført seg á slíkan hátt, at hann hevur givið debitor orsøk at halda, at kravið er slept.

– Eg havi ongantíð fyrr sæð, at tú missir eitt krav vegna passivitet, har mann veit, at debitor er í óndari trúgv, sigur hann.

Her sipar hann til, at Landsgrannskoðanin í øllum sínum frágreiðingum fyri fíggjarárini 2010 – 2014 hevði havt viðmerkingar um júst vantandi yvirtíðargjøldini hjá Almannaverkinum, uttan at nakar lat við seg koma. Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var í samsvari við avtaluna um arbeiðstíðarreglur, sum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag høvdu gjørt 17. desember 2007, at Almannaverkið ikki rindaði sínum starvsfólki yvirtíð.

## Bæði fyrning og passivitetur

Christian Andreasen heldur grundleggjandi ikki, at fortreytirnar at tosa um fyrning og/ella passivitet yvirhøvur eru til staðar í hesum málinum. Tað heldur meirilutin í serliga gerðarrættinum tó og roknar fyrningarfreistina fimm ár aftur eftir frá tí degi, málið bleiv beint í serliga gerðarrættin. Tað var 27. februar 2020, og tískil verður tann parturin av kravinum, sum umfatar tíðina fyri 27. februar 2015 dømdur at vera fyrnaður.

Men ikki nóg mikið við tí, tí meirilutin í gerðarrættinum, Henrik Møller og Durita Tausen, gjørdi av, at báðir partar í felag høvdu ábyrgdina av, at Almannaverkið aftaná sáttmálasamráðingarnar í 2015 slapp at halda fram at løna sínum starvsfólkum við vanligari tímaløn, tá tey arbeiddu yvir. Tí síðan tá hevði Pedagogfelagið sambært teimum báðum vitað um málið uttan at gera nakað við tað og tískil verið passivt.

Hesin passiviteturin galt sambært meirilutanum í serliga gerðarrættinum, til Føroya Pedagogfelag 18. september 2018 vegna tey trý starvsfólkini gjørdi Almannaverkið vart við, at tey áttu yvirtíðargjøld til góðar.

– Eg haldi hetta vera ekstremt marghåttligt. Kravið vaknar aftur, tá tað verður reist av Føroya Pedagogfelag. Men nú staðfestir gerðarrætturin passivitet. Altso kravið verður reist 18. september 2018, men gerðarrætturin statuerar passivitet fyri krøvini galdandi fyri 17. september og allan vegin aftureftir. Tá hongur hetta yvirhøvur ikki saman longur, sigur Christian Andreasen.

## Kanska í rættin

Mál, sum verða løgd fyri gerðarrættin eftir tænastumannalógini, kunnu ikki skjótast inn fyri rættin, men Christian Andreasen heldur, at tað helst kortini er ein møguleiki fyri tí í hesum málinum.

– Ein gerðarrættur skal jú taka sær av tulkingarspurningum í sambandi við sáttmálar, í hesum førinum er tað so tænastumannalógin og tær avtalurnar, sum hanga uppi í, sum er sáttmálin. Men tá tú so fert at tosa um próvgrundir sum fyrning og passivitet, so er tú farin út um tað, sum hoyrir undir tulking. Tí ber kanska til at royna tann spurningin við dómstólarnar. Tað er ein tung prosess at fara undir, men eg havi so nevnt tann møguleikan fyri Føroya Pedagofelag, sigur hann.

Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, sigur, at nevndin ikki enn hevur viðgjørt spurningin, hvørt tey skulu royna at fáa rættarskipanina at taka støðu í spurninginum um fyrning og passivitet.



*Uni Arge, journalistur og rithøvundur, er í ferð við at skriva søguna um tey fyrstu 40 árini hjá Føroya Pedagogfelag. Tað gongur væl at skriva, og nøkulunda væl er komið á leið, letur hann at*

*Mynd: Privatmynd*

# 40 ára rit komið væl á leið

**1. juni fyllir Føroya Pedagogfelag 40 ár, og í tí sambandi skrivar Uni Arge bók um felagið. Hon fer millum annað at snúgva seg um stóru menningina, sum felagið og yrkið hevur upplivað hesi árini, og søgan um Føroya Pedagogfelag er eisini søgan um, tá føroysku kvinnurnar fóru út at arbeiða, og fólk við menningartarni fluttu heimaftur, staðfestir rithøvundurin**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Tað hevur gingið við rúkandi ferð á námsfrøðiliga økinum, síðan Føroya Pedagogfelag varð stovnað 1. juni í 1982.

Hesi fyrstu 40 árini verða nú skjalfest í einum føðingardagsriti, eini bók, sum skal koma út á sjálvum føðingardegnum í summar.

Tað er Uni Arge, journalistur og rithøvundur, sum skrivar bókina, og hann letur væl at arbeiðnum, sum longu er komið væl áleiðis. Og tilfarið trýtur ikki.

– Felagið er væl skjalfest heilt frá stovnanini í 1982 til í dag. Tey fyrstu 12-14 árini er gerðabókin skrivað við hond, og tær, sum hava skrivað, hava verið nærlagdar og nágreiniligar. Nevndin hevur undan hvørjum aðalfundi lagt fyri limirnar ársfrágreiðing, og aðalfundirnir eru mangan væl endurgivnir.

– Alt finst tó ikki hjá felagnum. Bløðini skriva mangan um pedagogiska økið. Tílíkar greinar, serliga tey fyrstu árini, eru góðar tíðarlýsingar. Tingviðgerðir eru eisini ein góð kelda. Viðmerkingar til uppskot og álit eru ofta upplýsandi. Pedagogblaðið og vanlig prát við fólk eru eisini góðar keldur, sigur rithøvundurin.

## Framfýsið felag

Uni Arge greiðir frá, at Føroya Pedagogfelag frá fyrsta degi hevur verið eitt framfýsið felag.

– Tey, sum stovnaðu felagið, vistu, hvat tey vildu. Tey vildu skapa eitt sterkt fakfelagspolitiskt felag, sum skuldi hava samráðingarrættin á pedagogiska økinum og fáa á føtur eina føroyska pedagogútbúgving. Eisini vildi felagið tryggja sær, at arbeiðspláss lýstu pedagogisk størv leys. Bara pedagogar vóru í felagnum í fyrstani, og tí gjørdist eitt endamál, at pedagogar skuldu setast í øll størv á økinum. Hetta endamálið í viðtøkunum hevur ofta verið kjakevni, síðan hjálparfólkini formliga komu upp í felagið 1. januar 1987, sigur hann.

Áræðið og ein brennandi fakligur áhugi eyðkendi virskemið hjá undangongufólkinum, og hetta sást skjótt aftur í verki.

– Eitt tað mest hugtakandi er, at pedagogútbúgvingin gjørdist veruleiki bara fýra ár eftir stovnanina. Mítt egna fak, journalistikkurin, hevur í 30-40 ár tosað um okkurt slag av føroyskari útbúgving, men onki er nakrantíð hent. Pedagogarnir settu sær málið í viðtøkunum í 1982. Í 1983 varð ein nevnd undir Landsskúlafyrisitingini sett at gera tilmæli um útbúgvingina. Í 1984 fór hon av álvara til verka, og í 1985 var hon liðug við sítt arbeiði. Í 1986 fóru teir fyrstu pedagognæmingarnir so í skúla á Føroya Læraraskúla. Tey lógu ikki sjóvarfallið av sær, stevndu beint eftir eini føroyskari útbúgving og komu skjótt á mál, greiðir Uni Arge frá.

## Fyrsti sáttmálin

Langt var ímillum dagstovnarnar í Føroyum í áttatiárunum, og serforsorgin var donsk. Tí gingu nøkur ár, áðrenn Føroya Pedagogfelag skrivaði undir sín fyrsta sáttmála.

– Tað hekk saman við, at serforsorgin var blivin føroysk 1. januar í 1988. Heldur drúgt var at gera tænastumenn í Føroyum føroyskar, og tá semja var um viðurskiftini, varð sáttmáli gjørdur við landsstýrið um starvsbólkin 30. august í 1988. Sama dag varð sáttmáli undirskrivaður um hjálparfólkini. Fyrsti sáttmálin um dagstovnapedagogar kom ikki fyrr enn í juli 1990. Tað spældi ikki stillisliga av, tí fleiri kommunur sýttu fyri at viðurkenna, at landsstýrið samráddist vegna starvsfólk á kommunalum stovnum. Málið dró út í rættarskipanini í fleiri ár, sigur Uni Arge.

## Ein avgerandi broyting

Tó at Føroya Pedagogfelag sum fakfelag er lutfalsliga ungt, er yrkisøkið vaksið við rúkandi ferð, og limaskarin er fleirfaldaður ígjøgnum árini. Í dag eru oman fyri 2.000 limir – námsfrøðingar og hjálparfólk – í felagnum.

– Ein avgerandi broyting var, tá dagstovnaøkið bleiv lagt út til kommunurnar í 2000. Frammanundan skuldi landsstýrið sannførast um, at dagstovnar skuldu byggjast kring landið, men tá kommunurnar fingu økið at umsita, kom rættilig ferð á byggingina. Hetta skapti so ein uppaftur størri tørv á námsfrøðingum, og tørvurin er framvegis ikki nøktaður. Undranarvert er, at longu heilt tíðliga staðfesti Føroya Pedagogfelag, at fleiri lesandi áttu at verða tikin inn á pedagogútbúgvingina. Skiftandi nevndir hava staðiliga víst á tørvin, men illa gekst at vinna ljóð fyri kravinum í politisku skipanini, sigur Uni Arge.

## Bulmikil søga

Rithøvundurin letur væl at arbeiðnum, hann er í gongd við, men ásannar, at vavið á uppgávuni er heldur størri, enn hann væntaði, tá hann á sinni segði ja til at skriva bókina.

– Í fyrstani helt eg, at tað fór at ganga lutfalsliga skjótt at lýsa tey 40 árini. Men av tí, at felagið eigur nógv tilfar, og pedagogsøgan í Føroyum eisini er søgan um, tá kvinnurnar fara út at arbeiða, og fólk við menningartarni flyta heimaftur, gerst søgan heldur bulmikil. So hvørt sum felagið mennist, fer fram ein grundleggjandi samfelagsbroyting í Føroyum, men tað er ein spennandi pallur at skriva felagssøgu á, sigur Uni Arge, rithøvundur.

# ØKT JÁTTAN SKAL TIL BØRNINI

**Dagstovnaøkið er uppraðfest við tíggju milliónum krónum á 2022-fíggjarætlanini hjá Tórshavnar Kommunu. Málið er at fylgja øllum tilmælunum frá arbeiðsbólki í hesum valskeiðnum, sigur Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Atfinningarnar heglaðu niður yvir undanfarna býráð í Tórshavnar Kommunu fyri niðurpíning av dagstovnaøkinum, og tær hava hildið fram at hegla niður yvir nýggja býráðið eisini. Til 25. november, tá fíggjarætlanin fyri 2022 bleiv endaliga samtykt.

Tí í nýggju fíggjarætlanini er dagstovnaøkið uppraðfest við ikki minni enn tíggju milliónum krónum, og tær eru markaðar at brúka beinleiðis upp á børnini inni á stovunum í vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlum.

## Sjøtul settur á

Við øktu játtanini er Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar býráð, sum varðar av dagstovnaøkinum, eisini sannførdur um, at býráðið nú hevur loftað atfinningunum og sett sjøtul á eina uppraðfesting av dagstovnaøkinum, so tað um fá ár væl og virðiliga kann liva upp til tær væntanir, sum íbúgvarnir í kommununi av røttum eiga at hava til tey námsfrøðiligu tilboðini.

– Ja við hesum taka vit avgjørt hond um nakrar av teimum stóru trupulleikunum. Tað er ongin loyna, at neyðugu tøkini verða ikki tikin upp á hvørki eitt ella tvey ár. Tað nyttar onki at vera politiskt bláoygdur og halda tað. Men vit mugu tora at taka málini upp og byrja. Eg væntaði ikki at fáa 10 milliónir, tí tað eru øgiliga nógv onnur í eini býráðssamgonu, sum eisini vilja hava pengar til síni øki, og vit hava eisini nógv onnur øki og aðrar geirar, sum absolutt treingja til uppraðfestingar.

– Men nú hava vit tosað so leingi um hetta her, og vit hava eisini felt tað niður í samgonguskjalið við rættiliga sterkum orðingum, so eg eri ógvuliga fegin um, at vit byrja við at taka eitt stórt fet framá, sigur hann.



*– Nú hava vit tosað so leingi um hetta her, og vit hava eisini felt tað niður í samgonguskjalið við rættiliga sterkum orðingum, so eg eri ógvuliga fegin um, at vit byrja við at taka eitt stórt fet framá, sigur Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð*

## Tíð til annað arbeiði

Raðfestingin av dagstovnaøkinum í landsins fólkaríkastu kommunu tekur støði í einum áliti frá einum arbeiðsbólki, sum mentamálanevndin hjá býráðnum setti í mai at lýsa alt dagstovnaøkið í kommununi og gera tilmæli um ábøtur og uppraðfestingar.

Í álitinum eru tilsamans seks tilmæli, sum tilsamans eru mett at kosta 25,2 milliónir krónur at fremja í verki. Nøkur av tilmælunum eru útreiðsluneutral, og tað dýrasta er tilmæli nummar eitt, sum er mett at kosta 18,1 millión krónur. Tað er sostatt nógv tað dýrasta, og øll økingin í játtanini til dagstovnaøkið hesa ferð er eisini markað til hetta eina tilmælið.

Tilmæli nummar eitt hevur yvirskriftina "Tíð til annað arbeiði", og snýr seg um til samans at játta 15,18 tímar til hvørja vøggu- og barnagarðsstovu og 7,59 tímar til hvønn frítíðarskúlaflokk. Tímarnir skulu markast til annað arbeiðið.

## Ein viðurkenning

Tíð til "annað arbeiði" umfatar eitt nú fyrireikingartíðina, sum Føroya Pedagogfelag hevur samrátt seg til í sáttmálasamráðingunum, men sum Tórshavnar Kommuna higartil ikki hevur játtað eyka pening til. Tað hevur so merkt, at fyrireikingartíðin – í tann mun starvsfólk yvirhøvur hava gjørt sín sáttmálatryggjaða rætt galdandi – bara er farin burtur av tíðini, sum starvsfólkini skuldu brúkt upp á børnini.

Men "annað arbeiði" umfatar ikki bara fyrireikingartíð. Umframt fyrireikingartíðina til námsfrøðiliga arbeiðið nevnir arbeiðsbólkurin eina røð av øðrum uppgávum – starvsfólkafundir, skriv um serstørv, foreldrasamstarv, førleikamenning, felags foreldrafundir, foreldraviðtalur og innkoyring av nýggjum børnum – sum dømi um annað arbeiði.

Annfinn Brekkstein sigur, at stóra uppraðfestingin í einum av tíðini, sum námsfrøðingar og hjálparfólk skulu hava til annað arbeiði, eisini skal síggjast sum ein viðurkenning av tí, sum starvsfólkini á stovnunum hava sagt í fleiri ár.




*– Leiðarar og starvsfólk hava jú kært sína neyð og roynt at greitt frá, hvussu veruliga støðan er, men vit hava ikki lurtað nóg væl. Við hesum siga vit við tey, at tað er soleiðis, sum tit siga, og vit vilja vera við til at lyfta. Hetta er so ein byrjan*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

– Leiðarar og starvsfólk hava jú kært sína neyð og roynt at greitt frá, hvussu veruliga støðan er, men vit hava ikki lurtað nóg væl. Við hesum siga vit við tey, at tað er soleiðis, sum tit siga, og vit vilja vera við til at lyfta. Hetta er so ein byrjan, sigur hann.

## Eftirmeting

Mett verður í álitinum, at fyri hvørt námsfrøðiligt ársverk verða seks tímar um vikuna nýttir til annað arbeiði, og hjá einum hjálparfólki er talið 3,18 tímar um vikuna.

Annfinn Brekkstein leggur dent á, at tey eisini hava tryggjað sær eftirlit við, at pengarnir veruliga verða brúktir til tað, teir eru ætlaðir til.

– Mentamálanevndin vil, at játtanin skal koma børnunum á stovunum til góðar. Tí hava vit eisini samtykt, at tað, vit seta í verk, skal eftirmetast við ársenda 2022. Tað er fyri at staðfesta, at pengarnir veruliga fara út har, sum vit allatíðina hava sagt, at teir skulu fara, sigur hann.

Formaðurin í mentamálanevndini hjá Tórshavnar Kommunu er greiður yvir, at arbeiðið at lyfta og menna dagstovnaøkið ikki er liðugt, tá tilmælini hjá arbeiðsbólkinum eru framd í verki, og 25,2 milliónir krónur í uppraðfesting eru játtaðar.

Tí arbeiðsbólkurin ger í sínum formæli greitt, at tilmælini ikki nema við grundleggjandi spurningar sum til dømis áseting av eini minimumsnormering. Arbeiðsbólkurin staðfestir, at stórur tørvur er á at hækka grundnormeringina á dagstovnaøkinum afturat teimum átøkunum, sum mælt verður til í álitinum.

Tilmælini skulu bara tryggja, at normeringin, sum longu er ásett, verður brúkt upp á børnini.

– Hetta er sjálvandi eitt áhaldandi arbeiði, og nú snýr tað seg í fyrsta lagi um at loysa ein átrokandi tørv. Men arbeiðið steðgar ikki við tí, tí vit vilja øll hava eitt so vælvirkandi dagstovnaøki sum gjørligt, sigur Annfinn Brekkstein.



*– Eg havi veruliga lagt til merkis, hvat tað eru fyri fantastisk menniskju, ið tíma at arbeiða á hesum økinum. Ein slík kreppustøða, sum korona jú hevur verið, fær veruliga sanna virðið í menniskjum at vísa seg, sigur Heidi Henriksen, leiðari á sambýlinum Eirargarði 16 B í Havn*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Korona vísir sanna virðið á starvsfólkunum

**Á Eirargarði 16 B hava tey meira og minni verið í undantaksstøðu, síðan koronafarsóttin tók seg upp í fjør – annaðhvørt, tí tey hava fylgt herdum tilmælum, ella tí starvsfólkini sjálvboðin hava avmarkað seg**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Koronufarsóttin hevur kravt nógv av teimum flestu bæði so og so, men summi hava tó ofrað seg meira enn onnur. Millum teirra teljast starvsfólkini á sambýlinum Eirargarði 16 B í Havn.

Tey níggju búfólkini á sambýlinum eru óhjálpin og eru tískil bundin av, at starvsfólk eru um tey alt samdøgrið. Og tað mugu verða roynd starvsfólk.

Tá koronufarsóttin fór at gera um seg, sóu starvsfólk og leiðsla á Eirargarði 16 B tískil beinanvegin, at tey máttu vera serliga varin at halda smittuni burtur frá búfólkunum og ikki minni frá starvsfólkunum. Tí um fleiri av teimum løgdust sjúk av COVID-19, kundi tað verða ein vanlukka fyri búfólkini, tí ongi fólk við neyðugu royndunum eru at taka yvir.

## Býttu seg í toymi

Alt samfelagið lat aftur á Grækarismessu í fjør, tá farsóttin hevði gjørt landgongd í Føroyum, og á Eirargarði 16 B royndu tey sjálv at finna bestu loysnina at tryggja seg best møguligt. Tey býttu seg í toymi við fýra starvsfólkum í hvørjum, sum síðan syrgdu fyri ongantíð at koma í kropsligt samband hvørt við annað. Hetta fyri at tryggja, at um okkurt starvsfólk í einum toymi bleiv smittað, so slapp smittan ikki at breiða seg til onnur toymi.

– Vit gjørdu alla arbeiðsætlanina av nýggjum og skipaðu toymini við samdøgursvaktum. Vanliga hava vit annars bara samdøgursvakt um vikuskiftini, so hetta var ein serlig tíð fyri okkum øll. Summi av starvsfólkunum dámdu væl at arbeiða upp á tann mátan, tí tey sóu eisini ein fyrimun við langum vaktum, har tey aftur fyri spardu nógva frítíð saman. Fyri onkur starvsfólk var hetta hinvegin ógvuliga strævið. Tey vóru als ikki uppløgd til samdøgursvaktirnar, og sjálvt um vit royndu at blanda toymini so skynsamt sum møguligt,



so vóru tað nøkur, sum einfalt ikki orkaðu meira, tá vit endiliga kundu halda uppat aftur við samdøgurs-toymunum í mai í fjør, greiðir Heidi Henriksen, leiðari á Eirargarði 16 B frá.

## Reageraðu ymiskt

Á sama hátt var tað eisini ymiskt, hvussu búfólkini tóku nýggja gerandisdagin. Meðan samfelagið var afturlatið steðgaði virksemið á verkhúsinum Virkni eisini, har tey flestu búfólkini plaga at vera um dagin gerandisdagar.

– Vit sóu beinanvegin, at summi trivust væl við nýggju støðuna, tí tað bleiv ein sovorðin friður. Ongin skundur, og sama starvsfólkið var um tey um morgunin, tá tey skuldu upp, sum hevði lagt tey at sova kvøldið fyri. Tað fekk tey at kenna ein serligan tryggleika. Soleiðis var tað fyri summi, men fyri summi var tað als ikki so. Fyri tey bleiv tað skjótt alt ov nógv av tí góða bara at vera heima og ikki sleppa út. Atburðurin hjá teimum broyttist. Soleiðis eru vit so ymisk, bæði starvsfólk og búfólk, men vit royndu at fáa tað besta burtur úr, og at geva teimum, sum longdust út, okkurt annað í staðin, sigur Heidi Henriksen.

Tó at summi trivust í nýggju undantaksstøðuni, so var tað tó ein lætti hjá øllum, tá tey aftur kundu fáa ein nøkulunda vanligan gerandis-dag. Men beint eftir ólavsøku í fjør lat samfelagið enn einaferð aftur, og tá var ikki sørt, at tey, sum høvdu

*Berta Sigurbjørnsdóttir saman við Báru í Niðristovu. Tá samfelagið lat aftur, flutti Bára heim eina tíð, og starvsfólk vóru um hana har*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



*Jana Samuelsen, búfólk á Eirargarði 16 B, hevur dugað væl at tikið allan koronuhurlivasan. Her er hon saman við Evu Johannesen, hjálparfólki*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

tað ringast við at skula arbeiða í samdøgurtoymum, fóru at stúra.

– Men ta ferðina vardi afturlatingin tíbetur so stutt, at tað bleiv ongantíð nakar trupulleiki sigur leiðarin.

## Ikki bara ringt

Farsóttin hevur verið ikki sørt óhugnalig hjá teimum, sum hvønn dag eru um veikar borgarar, ið illa tola at gerast sjúkir, men farsóttin hevur eisini lagt okkurt gott eftir seg, greiðir Heidi Henriksen frá.

– Eg havi veruliga lagt til merkis, hvat tað eru fyri fantastisk menniskju, ið arbeiða á hesum økinum. Ein slík kreppustøða, sum korona jú hevur verið, fær veruliga sanna virðið í menniskjum at vísa seg. Og eg havi ikki orð fyri, hvussu nógv starvsfólkini her hava avmarkað seg og ofrað seg, øll sum eitt. Og tað er ikki bara, tí tey hava fylgt tilmælum og verið noydd at kanna seg fyri koronu alla tíðina. Tey gera tað ikki, tí onkur sigur, at tey skulu, tey gera tað av sínum eintingum. Tí tey eru so rædd fyri, at búfólkini skulu gerast sjúk.

– Sjálvt nú, tá bæði búfólk og starvsfólk langt síðani hava fingið triðja



*Jóhann Mohr, búfólk, mettur og væl settur, saman við Heidi Vinther Egholm, hjálparfólki*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



*Sirið á Brúgvaskifti, námsfrøðingur, er eitt av starvsfólkunum, sum hevur avmarkað seg nógv privat fyri at minka um vandan fyri at bera smittu til búfólk og starvsfelagar. – Tað havi eg fyrst og fremst gjørt fyri búfólkini skyld, sigur hon*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



*Herit Magnussen, hjálparfólk, sigur, at hon so smátt er farin at liva vanligt aftur aftaná arbeiðstíð*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

prikið, eru tað fleiri, sum avmarka seg sjálv nærum út um øll mørk – tey fara framvegis ikki í bindiklubb, í føðingardagar ella út ímillum onnur fólk. Tí tey hugsa fyrst og fremst um búfólkini her. Eg eri veruliga ovfarin av, at starvsfólkini taka sítt arbeiði í so stórum álvara og eru so góð við búfólkini, sigur hon.

## Uppiborið viðbót

Í fjør fall tað ikki í góða jørð allastaðni, tá formaðurin í Føroya Pedagogfelag alment legði upp til, at námsfrøðingar og hjálparfólk, ið tóku eyka tøk og í stóran mun avmarkaðu sín egna gerandisdag til frama fyri arbeiðsplássið vegna koronu, áttu at fingið eina viðbót.

Heidi Henriksen væntar tó ikki, at eitt slíkt uppskot hevði fingið eins kaldliga móttøku í dag.

– Ein skal eisini hava í huga, at vit broyttu vaktarætlaninna frá degi til





dags í mars í fjør, uttan at starvsfólkini søgdu nakað um, at til dømis arbeiðstíðarreglur ikki kundu yvirhaldast. Øll umstillaðu seg til broyttu arbeiðsviðurskiftini upp á eitt vikuskiftið, og tað kann eg ikki ímynda mær er komið fyri nakrantíð fyrr. Vit stóðu øll saman í hesi kreppistøðu fyri at verja okkara veiku búfólk.

*Níggju búfólk og 20 starvsfólk búleikast á sambýlinum Eirargarður 16 B í Havn*

*Mynd: Kári við Rættará*



*Korona ella ikki, Jákup Michelsen smílist altíð um alt fimmoyrað*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

– Eg aftri meg so ikki við at siga, at eg haldi, míni starvsfólk so ruddiliga høvdu uppiborið at fingið eitt sindur oman á lønina aftur fyri tað, tey gera. Eg veit væl, at tey gera tað uttan at vænta sær nakað eyka aftur fyri, men tey ofra seg veruliga, og tey gera tað sjálvboðið, sigur Heidi Henriksen.




Við ynskjum um eini
gleðilig jól
og eitt eydnuberandi nýggjár
Vit eru við tær – liv.fo